

# 58 milliardir minni í petroleumsskatti

Deil:




**Jan Müller**


18.07.2014 - 21:38

Oljan.fo

Olju- og gassídnaðurin á norskum øki rindaði 58,1 milliardir krónur minni í petroleumsskatti í fjør enn í 2012.

Eftir skipanini skulu feløg innan norsku olju- og gassvinnuna rinda petroleumsskattin í seks gjøldum. Tað fyrsta fellur til gjaldingar 1. august og tað seinasta tann 1. juni. Tað ber í sær, at tey trý fyrstu gjøldini verða goldin í inntøkuárinum og tey trý seinastu í álíkningarárinum.

Norska hagstovan sigur, at fyri inntøkuárið 2013 var skatturin hjá feløgunum 23 prosent minni enn í inntøkuárinum í 2012.

Samanumtikið rindaði olju- og gassvinnan 24,7 prosent minni í inntøkuárinum 2013, og svarar tað til góðar 58 milliardir krónur, sigur hagstovan í Oslo